# tey kendu merkini

## IKEA

I og K í IKEA koma frá fremstu stavunum í navninum á stovnaranum, Ingvard Kamprad, sum framvegis er drívmegin handan eitt av heimsins størstu møblaævintýrum.

Hinir stavirnir, E og A, stava frá nøvnunum Elmtaryd og Agunnaryd, sum eru nøvnini á bóndagarðinum, har stovnarin vaks upp, og á bygdini, har hann búði sum barn.

Ingvar Kamprad byrjaði í 1943 at selja klokkur, rammur, pennar og nylonsokkar - lutir, sum vóru kostnaðarmiklir undir krígnum, men, sum hann seldi bíliga. Fimm ár seinni seldi hann fyrstu møblarnar, sum hann hevði fingið menn í bygdini at smíða fyri seg.

Fløtu pakkarnir frá IKEA sóu fyrstu ferð dagsins ljós í 1956. Frá nú av skuldi kundin sjálvur skrúva lutirnar saman. Frá 1960 gekk tað skjótt framá hjá IKEA, vøruhús lótu upp bæði í Svøríki og uttanlands, og nú í 2008 eru fleiri enn 200 IKEA vøruhús um allan heimin.

BURGER KING










H&M

